# Meginreglur viðvíkjandi fartelefonnýtslu í Kvívíkar skúla

Sambært § 53, stk. 5 í lógini atferðarreglur skúlans, skulu øll skúlastýri saman við skúlaleiðslum gera meginreglur og mannagongdir fyri fartelefonir í skúlatíð.

**Meginreglan í Kvívíkar skúla er, at næmingar hava ikki snildtelefonir og snild-ur við í skúla.**

Foreldur kunnu ringja til læraran ella skúlastjóran, um tey hava átrokandi boð.

Um foreldur velja, at barn teirra skal hava fartelefon við í skúla, eru hesar reglur galdandi:

- Foreldrini kunna flokslærarin
- Fartelefonnýtsla er ikki er loyvd í skúladegnum, hvørki í undirvísingartímum ella fríkorterunum. Fartelefonnýtsla er heldur ikki loyvd áðrenn fyrsta og aftaná síðsta tíma.
- Fartelefonnýtsla er ikki loyvd á seturskúlum, útferðum o.s.fr.
- Lærarin, sum hevur flokkin fyrsta tíma um morgunin, savnar sløktu telefonirnar inn, og tær verða lagdar í telefonbakka í skúlastovuni.
- Næmingarnir fáa fartelefonirnar aftur, tá ið skúladagurin endar. Lærarin, sum hevur næmingarnar seinasta tíma, letur næmingunum telefonirnar aftur eftir loknan tíma.
- Skúlin kann geva undantøk, t.d. tá talan er um ser- og námsfrøðiligt átak ella vegna heilsuumstøður, so sum sukursjúku.

Um næmingur ikki heldur hesar reglur, so kann telefonin takast inn, og onnur tiltøk kunnu setast í verk

Samtykt og góðkent av Skúlastýrinum tann 19.03.2026